# Stúra fyri at Býráðið tekur hølið frá teimum

**Øll tey, sum brúka Tilhaldið í Havn, fingu ein rættiligan skelk, tá ið tey frættu, at Býráðið viðgjørdi eina umsókn um at gera matstovu í kjallaranum**

ELDRARØKT
*Áki Bertholdsen*



*Tey, sum brúka Tilhaldið hava verið rættiliga uppreitt av, at Býráðið hevur viðgjørt eina umsókn um at taka kjallaran í Tilhaldinum til matstovu. Tey høvdu ikki ætlað at latið kjallaran frá sær við góðum*

Øll tey gomlu, sum brúka Tilhaldið í Havn, fingu ein rættiligan skelk herfyri, tá í tað frættist, at ein maður hevði søkt Býráðið um loyvi til at gera matstovu í kjallaranum í Tilhaldinum.

Hetta hevur loypt rættiligan ótta á tey, sum brúka Tilhaldið, tí kjallarin er sjálvt hjartað í Tilhaldinum, har tey hava goymslur, frystiboks, grovkøk, men eisini rúm til ymiskt handalig ítriv og samkomur og framsýningar, tá ið kvøldsetur eru, ella aðrir gestir eru.

– Missa vit kjallaran, er onki eftir, tí Tilhaldið kann ikki virka við ongum kjallara, sigur Vanja Petersen, sum er dagligur leiðari í Tilhaldinum.

Annars skilir hon, at boð eru eftir kjallaranum, tí hann man vera hugnaligasti kjallari í landinum.

Eisini Hanna Lisberg, sum er skrivari í nevndini fyri Tilhaldið, hevur verið rættiliga uppreitt av tíðindunum um, at Matstova skuldi gerast í Tilhaldinum.

Hon sigur, at tað hevði ikki verið uttan stríð, at tey lótu kjallaran fara, tí í oktober í 2000 samtykti Býráðið einmælt, at Tilhaldið skuldi fáa brúksrætt til øll húsini, so hvørt sum tey, sum vóru har frammanundan, funnu onnur høli.

Síðani hava tey fingið kjallaran til taks og tá ið Kvøldskúlin fær høli í býnum, fáa tey eisini loftið.

– Býráðssamtyktin frá 2000 er galdandi til ein onnur er gjørd og eg vildi fegin sæð tann býráðs-politikara, sum fór at broyta tað býráðssamtyktina, so at tey eldru mistu Tilhaldið til frama fyri eina matstovu, sigur Hanna Lisberg.

Tilhaldið hevur ovurstóran sosialan týdning í Havnini. Har koma eini 40-60 fólk um dagin, og javnan verður skipað fyri ymsum tiltøkum. Alt árið í fjør brúktu 11.220 fólk Tilhaldið. Tað eru mest pensjónistar, sum brúka Tilhaldið, men yngri støkka eisini inn á gólvið við hvørt, ikki minst tá ið tiltøk eru.

Tey, sum brúka Tilhaldið, hava tí sagt Býráðnum kortanei til, at kjallarin verður tikin til matstovu.

# Tey gomlu í Tilhaldinum í Havn hava onki at ræðast

ELDRARØKT
*Áki Bertholdsen*



*– Tey, sum brúka Tilhaldið í Tórsgøtu kunnu vera púra rólig. Tey eiga fyrsta rætt til kjallaran í húsinum og hann verður ikki tikin, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn*

– Øll tey gomlu, sum brúka Tilhaldið í Havnini hava onki at ræðast. Tey hava fyrsta rætt til Tilhaldið og tann rættin missa tey ikki.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havnini kann í dag sissa øll tey mongu, sum dagliga brúka Tilhaldið í Havnini.

Hann váttar, at Býráðið hevur fingið eina umsókn frá manni, sum hevur hug at gera matstovu í kjallaranum í Tilhaldinum.

– Umsøkjarin ætlaði at gera Grasagharð til ein part av matstovuni og tað kundi gjørt sítt til at skapa meiri lív í økið, sigur borgarstjórin.

Men samstundis kann hann beinanvegin sissa øll tey, sum hava stúrt fyri Tilhaldinum:

– Tað er samtykt, at vit ganga ikki umsóknini á møti, sigur hann.

Hann viðurkennir fult út, at Býráðið hevur einmælt samtykt, at húsið skal brúkast til Tilhald og tað verður ikki brúkt.

–Vit hava fingið nógvar umsóknir um kjallaran í Tilhaldinum, men vit hava hvørja ferð víst á, at hølini eru ikki tøk.

Men kortini helt borgarstjórin, at hendan umsóknin varð øðrvísi.

– Vit hildu, at tey, sum brúka Tilhaldið kundu eisini fingið gagn av hesum, tí ein møguleiki er, at Tilhaldið fekk leiguna fyri kjallaran.

Hann sigur, at býráðið tí helt, at tað var rætt at spyrja Tilhaldið, hvar tað helt um ætlanin at gera matstovu í kjallaranum.

– Tilhaldið hevur svarað, at tað vil ikki hava Matstovu í Kjallaranum.

Og harvið verður tað, sigur borgarstjórin. Hann sigur, at Sosiala nevnd viðgjørdi málið týskvøldið og har varð samtykt at svara umsøkjaranum, at kjallarin í Tilhaldinum er ikki tøkur til Matstovu.

Men hann sigur, at nú veit Býráðið eisini av, at kjallarin í Tilhaldinum er ikki tøkur og sostatt sleppur Býráðið undan at brúka tíð uppá viðgera fleiri umsóknir.

– Hereftir kann umsitingin avgreiða møguligar umsóknir beinanvegin við at vísa, at hølið er ikki tøkt.



# Torført hjá USA at roykja bin Laden út við hervaldi



**USA hevur fáar freistandi møguleikar í tí stríðnum móti yvirgangi, sum leiðslan í Washington er farin at royna eftir yvirgangsálopini týsdagin í farnu viku. Hermálsligir greinarar siga, at tað í tí væntaða krígnum verður heldur barst við njósnarum og kommandohermonnum á odda enn við tí ómetaliga amerikanska stríðsmáttinum, sum amerikanarar hava brúkt móti øðrum tey seinnu árini**

*Sonne Smith/ Ritzau/AFP*

Donald Rumsfeld, amerikanski verjumálaráðharrin, hevur fleiri ferðir sagt, at terrorkríggið verður drúgt, dýrt og óvanligt — nakað heilt annað enn tað, USA hevur upplivað í teimum seinastu kreppunum móti eitt nú Irak og á Balkan.

“Fólk hugsa um tey kríggj, vit hava hugt at í seinastuni. Nakað við krússararakettum, ið verða skotnar út og raka og eru at síggja í sjónvarpinum. Tað er ikki tað, sum hetta snýr seg um,” segði verjumálaráðharrin seinasta vikuskifti.

At døma eftir teimum ábendingum, sum Donald Rumsfeld og aðrir í Washington-umsitingini eru komnir við, er ein sonevnd lágorkukreppa væntandi við duldum amerikonskum kommandoálopum, ið stundum verða kvett av við onkrari krússararakett ella einum loftálopi.

Samstundis snýr tað seg um upplýsingarkrígsførslu til tess at spora og spilla peningaflytingar til terroristar og til at lumpa teir og geva teimum skeivar upplýsingar, tá ið høvið býðst.

“Gamaní hava vit eina fult modernaða, velduga stríðsmegi, men okkum vantar eitt gott mál at raka,” sigur Andrew Krepinevich, hermálsligur serfrøðingur og stjóri á stovninum fyri strategisk mál og fíggjarmál í Washington.

“Tað ber í sær, at tað kann blíva ein kreppa við nógv minni stríðsmegi og nógv meiri bundin av hollum upplýsingum, kvikum og huldum hermonnum, sum eftir einari løtu kunnu fara langt burtur út í verðina at stríðast,” sigur hann.

Líkt er til, at aðalmálið hjá USA í løtuni er at taka ella drepa Osama bin Laden, tann saudiarabiska milliarderin, sum er undir illgruna fyri at hava skipað fyri yvirgangsatsóknunum í USA, og at beina fyri hansara heimsumfatandi yvirgangsliði.

Paul Wolfowitz, varaverjumálaráðharri, setti sær í síðstu viku eitt nógv víðari mál, nevnliga at støðga londum, sum hjálpa ella hýsa yvirgangsmonnum.

Bæði málini hava við sær, at Afghanistan er í skotlinjuni fyri tí amerikanska krígnum, tí at bin Laden heldur helst til í Afghanistan sum “gestur” hjá Taliban-stýrinum.

Tað ber illa til at hugsa sær ein ólagaligari vígvøll. Afghanistan er eitt land við víðum oyðimarkarøki, illa framkomandi fjøllum við trongum gjáum. Í tvey áratíggju er landið illa løstað av einum kríggið, sum millum annað rak tann sovjetska innrásherin úr landinum í 1988.

Hermenninir úr gamla Sovjetsamveldinum eru ikki teir einastu áleyparar, sum eru riknir úr Afghanistan. Gjøgnum tíðina hava eisini Aleksandur Hin Mikli, tey mongolsku harkaliðini og bretska heimsveldið lútað fyri afghanarum.

Ein amerikonsk innrás er “væntandi tað seinasta, nakar fer at hugsa um”, sigur Krepinvich.

Michael O’Hanlon hjá hugskotsbankanum Brookings metir, at ein innrás á landi hevði kanska lukkast, men hon kann krevja “hundraðtúsundtals” mannalív.

“Men vandi er eisini fyri, at ein innrás miseydnast við landslagnum og fíggindaskapinum og mótstøðuvilj hjá afghanarum í huga,” leggur hann aftrat.

Bush forseti hevur eisini tann møguleika, at hann kann royna at “roykja” bin Laden út, siga eygleiðararnir.

Tað fer at krevja, at hermenn verða sendit til støðir nærindis Afghanistan sum Usbekistan og Pakistan ella enntá har norðuri í Afghanistan, har uppreistrarmenn ráða. Tað kann geva amerikanarum møguleika fyri snarálopum, eins og stríðstyrlur kunnu brúkast.

Men hetta fer at krevja upplýsingar. Nettar upplýsingar frá njósnarum í felagsskapinum hjá bin Laden, og mong ivast í, at tann amerikanska fregnartænastan fær sníkt seg inn á tann innasta skaran hjá bin Laden.

Góð úrslit hjá amerikanarum valdast eisini, um lond sum Pakistan, og enntá Iran, vilja skifta fregnartænastuupplýsingar við USA.

“Lykilin til hetta er upplýsingar. Vit vilja ikki senda kommandohermenn inn í eitt slysálop ella eina snaru. Vit vilja, at tað eru teir og ikki tú, ið verður tikin á bóli. Og snarálop er lykilin til virkið verk,” sigur Krepenvish.

# Oyggin í havinum

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út ungdómsbókina Oyggin í havinum eftir Anniku Thor**

ÚTGÁVA

Oyggin í havinum er fyrsta av fýra bókum um systrarnar, Steffi og Nelli, sum í 1939 verða sendar úr Wien í Eysturríki til Svøríkis at vera, tí týskararnir hava hersett heimland teirra. Steffi er 12 ár, og Nelli er nøkur ár yngri. Mamman og pápin eru eftir í Wien, tey fáa ikki loyvi at fara. Systrarnar skulu búgva á einari oyggj stutt frá Göteborg, hjá hvør sínum húski. Í teimum fýra bókunum fylgja vit systrunum, til kríggið endar í 1945. Tá er Steffi 18 ára gomul. Fyrsta árið eru báðar í oynni, men so fer Steffi til Göteborg at ganga í framhaldsskúla, og Nelli verður eftir.

Tað er ikki lætt at koma fremmandar í fremmant land, tí hóast fólk flest tykjast at taka væl ímóti teimum, so duga bara fá at ímynda sær ræðuleikarnar, sum Steffi og Nelli longu hava upplivað, og sum mamman og pápin skriva um. Men tær fáa brátt annað at hugsa um, t.d. vinkonur, nýggju heimini og skúlan. Nelli er so lítil, at hon gloymir og, henni fellur lætt at læra svenskt og fáa nýggjar vinir. Tað er truplari hjá Steffi, sum eisini hevur lovað mammu og pápa at ansa væl eftir lítlusystur.

Hóast hetta er fyri umleið 60 árum síðan, viðgera bøkurnar evni, sum eisini eru uppi í tíðini nú, t.d. happing, átrúnaður, støðan hjá flóttafólki, rasismu, frælsi, lívið og deyðan.

Høvundurin, Annika Thor er fødd í Göteborg í 1950. Foreldrini eru jødar. Mamman flýddi undan nasistunum í Týsklandi, og hon kom til Svøríkis í 1933. Eisini tvey systkinabørn Anniku komu til Svøríkis við ongum foreldrum í krígnum, so hon hevur hoyrt nógvar søgur um flóttafólk, tá ið hon vaks upp.

Annika Thor er útbúgvin bókavørður, og hevur harafturat lokið fjølmiðlaútbúgving. Hon hevur skrivað handrit til fleiri filmar, m.a. ungdómsfilmin SP ella K - sannleiki ella avleiðing. Annika Thor býr nú í Stokkhólmi saman við sínum.

Fyrsta bókin, hon skrivaði, er Oyggin í havinum í 1996. Í 1997 kom, umframt næstu bókina um Steffi og Nelli, eisini SP ella K - sannleiki ella avleiðing, sum Bókadeildin gav út í 1999 í týðing eftir Katrin Michelsen. Fyri hesa bókina fekk hon mætastu svensku bókmentavirðislønina, “Augustpriset”. Seinni hevur hon fingið nógvar virðislønir fyri bøkur sínar, m.a. “Deutcher Jugendlitteraturpreis” 1999 og “Astrid Lindgren priset” 2000.

Karl N. Hansen týddi Oynna í havinum.

Bamsan & Norðfashion
í miðbýnum
Hava gjørt brakandi umvælingar og eru flutt niður á stovuhædd
Hópin av nýggjum vørum, bæði til børn og tilkomin

Støkk inn á gólvið
BAMSAN & Norðfashion
N. Finsensgøta 20 • 100 Tórshavn • Tlf. 32 25 50